tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Aki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Níclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Tillukku Atlantsflog

Oddagrein

DAGURIN í gjár var ein stórur dagur í føroysku flogsøguni. Tá kom nýggja flogfarið hjá Atlantsflogi til Føroya. Leiðslan í Atlantsflogi hevur í longri tíð havt samráðingar um keyp av einum nýggjum flogfari til felagið. Nú er so gjørdur keypssáttmáli fyri umleið 60 mill. kr. Talan er um eitt brúkt flogfar av sama slagi sum tað flogfelagið eigur. Tað liggur nógv stríð og stev aftanfyri royndirnar hjá føroyska flogfelagnum at fáa tvey bein at standa á.

FLOGFELAGIÐ hevur ikki bara havt tað lætt. Mangan hevur mótgangurin verið stórur, og at byggja nakað upp frá botni av, meðan annað flogfelag hevur átt rutuna og harvið royndirnar í langar tíðir, hevur ikki bara verið lætt. Tað eru tey, sum hava ynskt føroyska flogfarið, har piparið grør. Men tað hava so verið onnur, bæði politikarar, vinnulívsfólk og ikki minst fólkini í fyritøkuni, sum hava sett sær sum nærum lívsmál ikki bert at halda lív í men eisini at menna hetta føroyska felagið.

Í dag síggja vit úrslitið av hesum arbeiði. Øll starvsfólkini hjá Atlantsflogi eiga at vera errin henda dag, og ikki minst er hetta keypið tí ótroyttiliga og framfýsna stjóranum fyri at takka, ið hevur fingið fulla uppbakking frá síni nevnd. Men eisini tey, sum vóru við frá byrjan eiga sín lut í hesum. Vit ynskja tykkum øllum hjartaliga tillukku. Stjórin í felagnum segði við útvarpið í gjár, at ætlanin er umframt at brúka flogfarið á Føroyarutuni, eisini at brúka tað í útlendskari flúgving. Nú verður so arbeitt við at fáa flogfarinum arbeiði á fremmandum rutum. Tað er greitt, at tvey flogfør á Føroyarutuni eru nærum nóg mikið til at nøkta tørvin her. Men eftir okkara meting hevur tað stóran týdning, at kappingin á Føroyarutuni heldur fram.

TÍ ER TAÐ GOTT, at vit hava tvey feløg, sum reka hesa flúgving. Vit kunnu so bara vóna, at kappingin verður fair og góð, og at hon kemur brúkaranum til góða. Við hesum keypi hevur Atlantsflog útmeldað til Føroya fólk og umheimin, at felagið ætlar sær at vera við í økta virkseminum, ið verður á Føroyaleiðini næstu árini. Vit hugsa her bæði um nýggju ruturnar til okkara grannalond og um teir stóru møguleikar, ið liggja í flutningi av oljufólki. Við keypinum av flogfarinum hevur Atlantsflog lagt lunnar undir ein skilagóðan og spennandi útvikling, har føroyingar sjálvir vera við til at veita tænastur og harvið eisini vinna pening til landið. Gott í tykkum. Vit eru altíð so errin, tá nýggj skip koma í flotan. Hesin dagur er ikki mætari.

Sosialurin

Lesarabrævur:

Hergeir Nielsen er eingin svíkur

Javnaðarflokkurin, sum rýmdi undan ábyrgd fyri 4 árum síðan, hevur á pappírinum sett sær fyri at tyrva Suðuroynna undir í gulli og grønum skógum.

Flokkurin hevur haraftur-at sett sær fyri, at hvørja fer hann ikki kemur á mál - og tað ger hann ongantíð - so er tað Hergeir Nielsen, sum hevur skyldina. Tað er hann sum svíkur.

Hetta er ein einfaldur boðskapur, sum øll skilja, mo. Rógvi Thomsen í Sosialinum fríggjadagin.

Víst verður til eitt skriv, sum eg havi skrivað SOC, Suðuroyar Oljuvinnuráð, tann 10. nov. 1999.

Mynd av skrivinum er prentað í Sosialinum, og sjálvandi við so smáum stavum, at tað ikki kann lesast, og skal eg tí greiða frá, hvat har stendur.

Har verður fyrst takka fyri ein frálíkan fund í Øravík, tann 23. okt., og síðani sagt frá, at oljumálið fleiri ferðir hevði verið til viðgerðar á floksfundum okkara, ma. vísandi til ynski mítt um at fáa útgerðarhavnina lagda í Suðuroy, og har eg skilti seinasta fundin soleiðis, at full undirtøka var fyri tí.

Tá skrivað varð, at tað varð "einmælt samtykt," var hetta sjálvandi ikki at skilja sum einmæltu samtyktirnar á tingi, har atkvøtt verður við atkvøðuskipan eftir at mál hava fingið 2 - 3 viðgerðir. Soleiðis fer vanligt floksarbeiði, har nógv mál eru undir støðugari viðger, ikki fram.

Eitt tílíkt mál var oljumálið, sum tá lá í Tinganesi til viðgerðar, og sum tíanverri ikki kom á tingborð í tí líki tú vildi tað. Broytingar, meðan mál liggja í Tinganesi, og verða viðgjørd úti í flokkunum, eru ikki óvanligar.

Orðingin "einmælt samtykt" átti ikki at komi fyri í einum máli á tí støði, tað tá var, og skal eg tí taka hana á mín kappa. Somuleiðis varð hon rættað tvær ferðir fyri røttu viðkomandi..

Ætlanin var at avgreiða útjaðarapartin av oljumálinum úti í Tinganesi, men tað miseyðnaðist. Tí boðaði eg SOC frá á tveimum seinni fundum, at ikki kundi roknast við einum samdum tjóðveldisflokki undir tingviðgerðini.

Í brævi mínum stóð eisini, at eg heldur enn fegin vildi arbeiða víðari við málinum, og tað geri eg framvegis, men ivasamt er um SOC hevur áhuga fyri hesum.

SOC hevur leitað aðrar vegir, og hevur prentað og almannakunngjørt eitt innanhýsis skriv millum eitt privat felag og ein politiskan flokk. Hóast rættað tvær ferðir munnliga á tveimum fundum í SOC fer upprunaskrivið út, og kann endamálið einans vera at niðurgera undirritaða, og tað eyðnaðist væl.

Í brævinum stóð ongastaðni nakað um, hvat flokkurin í heila tikið stóð samdur um í einum komandi tingmáli, sum jú eingin kendi til fulnar, og so als einki um, hvussu tjóðveldisflokkurin á tingi fór at atkvøða í einum ikki kendum minnilutauppskoti frá Javnaðarflokkinum.

Aftan á at eg mælti til og greiddi atkvøðu fyri hesum minnilutauppskoti skilji eg á Rógva Thomsen, næstformanni í SOC, at hann heldur meg ikki vera skikkaðan at sita á tingi, tí at eg skal hava svikið Suðuroynna.

Hetta heldur hann, hóast eg á tveimum fundum í SOC í Øravík, tann 4. des. 1999, saman við øðrum tingmonnum, og tann 9. januar 2000, hevði boðað frá, at ikki kundi roknast við einmæltari samtykt á tingi frá umboðum tjóðveldisfloksins.

Hesi tíðindi er Rógvi Thomsen tíanverri lagstur á.

Í staðin fyri síggja vit skrivligt innanhýsis skjal í bløðunum, sum — enn eina ferð - hóast tað er rættað tvær ferðir, kortini skal út fyri at skaða meg og flokk mín.

Kent er, at oljufeløg liva í einari sera afturlatnari verð. Hetta var ikki tann hepnasti leikurin, ið eitt so lítið og eitt so ungt oljufelag, kundi funnið upp á at gjørt.

Í oljumálinum eru mangir leikir eftiri enn, serliga fyri Suðuroynna, men SOC eigur at umhugsað, hvussu skikkað eitt oljufelag, sum onnur ikki hava fult og heilt álit á, er.

Eitt tílíkt oljufelag hevur Rógvi Thomsen gjørt SOC, Suðuroyar Oljufelag, til í dag.

Hergeir Nielsen

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

THOMAS HERLUF THOMSEN

andaðist hósnáttina 3.2., 82 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd í útvarpinum.

Familjunnar vegna

Eileen

Eysturoyggin í fokus

Síðsta greinin í røðini um vinnulívið í Eysturoynni kemur í blaðið týsdagin.

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða mamma, omma og vermóðir

BORGHILD KRISTIANSEN

doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum. Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á dagstovninum á Lágargarði.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til og fylgdu henni til hennar seinasta hvíldarstað.

Elin, Jón, Belinda og Rebecca

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri maður, pápi, verfaðir og abbi

HANS HENRIK STRØM

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Petur Martin Rasmussen, prest, fyri troystarrík orð. Takk til berarar, sangarar og kirkjutænarar.

Takk til Strandferðsluna og til Suðuroyar sjúkrahús. Takk til øll, sum hjálptu til ervið. Takk fyri peningagávur til Tvøroyrar kirkju, kransar, blómur, vitjanir, uppringingar og brøv.

Takk til tykkum mongu, sum fylgdu Hans Henriki til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna

Helga, Ásbjørn, Rannvá, Helena og Helgi

Atlantic Airways keypt nýtt flogfar

Nýggja flogfarið hjá Atlantic Airways lenda í Vágum seinnapartin fríggjadagin klokkan 14.00. Nýggja flogfarið er av sama slag, sum gamla flogfarið hjá Atlantic Airways. Flogfarið er keypt úr Bretlandi fyri góðar 50 mió. krónur. Í løgugrunnurin er við í fíggingini av nýggja flogfarinum

Nýggja flogfarið hjá Atlantsflog er sam slag sum gamla flogfarið - bara tvey ár eldri. Tað er bygt í 1985. Tað er keypt fyri góðar 50 mió krónur, og fleyg upprunaliga í USA

ÓLAVUR Í BEITI

Í gjár beint eftir kl 14 lendi nýggja flogfarið hjá Atlantic Airways lenda á flogvøllinum í Vágum. Líkindini vóru ikki av teim bestu, so ivasamt var, um flogfarið fór at lenda. Flogfarið er av sama slag, sum gamla flogfarið hjá Atlantic Airways, eitt British Aerospace 146-200 flogfar.

Ætlanin var, at løgmaður, Anfinn Kallsberg, skuldi taka ímóti flogfarinum, men honum barst frá. Við flogfarinum, var samferðslumálaráðharrin, Finnbogi Arge, sum var umboð landsstýrisins á móttøkuna. Eisini Magni Arge, stjóri í Atlantsflog var við flogfarinum.

Leingi hevur verið í umbúna at keypa annað flogfar, táið kortini er neyðugt hjá Atlantic Airways á hvørjum ári at leiga eitt flogfar aftrat til summarhálvuna til tess at røkja ferðasambandið við útheimin á brúkligum støði.

Leigast út

Í samrøðu við Internet Sosialin beint fyri klokkan 20 hóskvøldið dugdi Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, ikki at siga endaliga, um tað fór at eydnast flogfarinum at lenda til ásettu tíð fríggjadagin, men arbeitt varð fram ímóti tí - bert onkur smáting restaðu í.

Eitt nú var arbeitt við, at flogfarið longu mánadagin skal leigast út til summarflúgvingin hjá Atlantsflog byrjar í juni. Longu fríggjakvøldið skuldi flogfarið avstað aftur at flúgva fyri eitt størri flogfelag í Evropa. Endaligur sáttmáli var undirskrivaður, áðrenn blaðið fór til prentingar og áðrenn flogfarið setti kós móti Føroyum, men ikki fekst at vita, hvat felag talan er um, og floglíkindini vóru, sum longu nevnt, heldur ikki av teim bestu, so ivasamt var, um flogfarið fór at lenda.

Fyrsta túrin 2. februar

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, flogternur, flogskipar og mekanikarar vóru farin yvir til Onglands at flúgva flogfarið til Føroya, haðani tað er keypt fyri góðar 50 mió. krónur. Flogfarið er bygt í 1985 og fleyg upprunaliga í USA.

Seinastu árini hevur tað flogið fyri bretska felagið Debon Air. Fyrsta túrin síðan yvirtøkuna fleyg flogfarið 2. februar úr Stansted uttan fyri London, har tað hevur verið til eftirlit og umvæling, til Manchester.

Við í fíggingini av flogfarinum er løgugrunnurin, sum tann 15. desember í fjør játtaði Atlantic Airways figging.

Móttøka var í Hangarinum á Flogvøllinum klokkan 16 í sambandi við, at Atlantic Airways fekk nýggja flogfarið.

Seinastu sýningarnar av Móðir Sjeystjørnu

Seinastu sýningarnar av Móðir Sjeystjørnu – ein tónleikamynd, verða nú á leikhúsinum hjá Grímu á Gamla Meiarínum í Tórsgøtu.

Leikurin byggir á skaldsøguna hjá William Heinesen við sama navni.

Sýningar fara fram sum lýst í útvarpi og bløðum.

Leikurin er sera væl umtóktur og hevur fingið sera góð ummæli. Fullsettar skúlasýningar eru um dagarnar og neyðugt hevur verið við eyka skúlasýningum alla hesa vikuna. Almennu sýningarnar eru eisini væl vitjaðar. Higartil hava umleið 2500 fólk sæð leikin.

Leygarkvøldið verður spælt kl. 17.00 og sunnudagin kl. 16.00. Søleiðis er eisini møguleiki hjá avbygdafólki at sleppa til hús aftur eftir sýningina. Tað verður ikki farið á bygd við leikinum Móðir Sjeystjørna. Atgongumerki kostar kr. 100,00, men bólkar yvir 20 fólk fáa avsláttur. Eisini ber til hjá virkjum og stovnum at keypa sýningar. Meira fæst at vita um hetta frá Grímu ella Kunningarstovuni.

Leikurin viðger tey afturvendandi menniskjansligu fyribrigdini, bardagan millum lív og deyða, tað tímiliga og tað æviga, dreym og veruleika, kærleika og vón og mangt, mangt annað. Teodor E. D. Olsen skrivar millum annað hetta í Sosialinum 18. jan.: »Men størstur er hóast alt kærleikin, og eins og tokkin til leiklistina ivaleyst hevur drivið verkið hjá Grímu, eiga vit eisini at vera góð við okkara yrkisleikbólk, sum enn einaferð hevur ríkað okkum við einum góðum leiki«.

Pallmyndin hjá Elisu Heinesen er einfald, men sera spennandi og nýskapandi, og gevur saman við ljósinum leikinum aðra vídd, enn vit vanliga eru von við. Elin Michelsen skrivar soleiðis um pallmyndina í Dimmalætting 20. jan. »Til at byggja myndina fær søgan góða hjálp av pallmyndini, sum eins og fólkini í leikinum, hevur so nógvar loynidómar, sum verða avdúkaðir so við og við, og hetta hevur við sær, at áskoðararnir ikki kunnu hyggja burtur eina einastu løtu«.

Plakatin til leikin er klippið hjá William til bókina, og hevur Elisa eisini gjørt nýtt lay-out til myndina, so úrslitið er sera vøkur, litrík plakat, sum fæst til keyps í bókabúðunum og í samband við sýningarnar.

Tónleikurin og ljóðmyndin hjá Stamen Stantchev gevur eisinileikinum sín serliga hugtakandi dám.